## Atlantic Music Event á alnetinum

Enn eru ikki komin ummælið av Atlantic Music Event í nakrar av teimum stóru donsku miðlunum. Men onkrar heimasíðir nevna tiltakið. Lindasiden, ið er heimasíðan hjá donsku tónleikafjepparinnuni Lindu, ummælir Atlantic Music Event við jaligum lýsingarorðum. Hon sigur, at allir bólkarnir vóru egnir á sín egna hátt, og hetta gjørdi kvøldið til eina áhugaeverda uppliving.

Hon heldur at stemningurin var hugnaligur og heitur í Lítla Vega hetta leygarkvøldið, tá føroyingar hildu fólkaveitslu. Hon var ikki í iva um, at hon var partur av einum sera lítlum donskum minniluta, millum nógvu føroyingarnar.

Danska kvinnan, ið einki tilknýti hevur til Føroyar, var boðin á konsertina av Norðurlandahúsinum, og hon takkar Norðurlandahúsinum fyri tónleikin. Allir tríggir bólkar verða róstir fyri sínar framførslur. Ummælið liggur á www.lindasiden.relief.dk

### 808 myndir av Atlantic Music Event

Á heimasíðuni squiip.dk liggja ikki færri enn 808 myndir av Atlantic Music Event í Vega. Síðan hevur fleiri mydasøvn, og m.a. 446 myndir av G!, 25 myndir av Regattaini hjá Neystinum í Ishøj og 108 myndir frá konsertini hjá teimum trimum havfrúnum í Keypmannahavn.

Á síðuni eru annars eingir upplýsingar um, hvør stendur aftan fyri síðuna, men tilknýti til Føroyar tykist eyðsýnt. Myndasøvnini liggja á squiip.dk/pics

# Sic og The Dreams í TB-húsinum

**Bólkarnir Sic og The Dreams eru á lítlari konsertferð og leygarkvøldið spæla hesir bólkarnir í TB-húsinum**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Sic og The Dreams eru bólkar, sum fleiri av røttum hava sera góðar vónir um. Til dømis hevur bólkurin The Dreams tikið lut í kapping á MTV,

Sic og The Dreams eru á konsertferð og leygarkvøldið spæla hesir báðir bólkarnir í TB-húsinum á Tvøroyri.

Bólkarnir eru væl umtóktir millum ungfólk og eru eisini millum ungu føroysku bólkarnar, ið royna at fáa fótin fastan í uttanlands.

Talan er um diskotek og konsert og byrjað verður klokkan 23. Bussar koyra úr Vági og úr Hvalba klokkan 23:30 og kostnaðurin fyritiltakið er 120 krónur, siga fyrireikarararnir.

# Eivør var tann bjartasta stjørnan í Tønder

Á Tønderfestivalinum í ár var dentur lagdur á at bjóða nýggj, ung og spennandi nøvn fram. Jp.dk ummælir hendan part av festivalinum, og tekur framførsluna hjá Eivør fram, sum verandi avbera góða. Ummælarin fýlist bert á eitt, og tað er at konsertin ikki var nóg long, tí honum hevði dámt at lurta í minst ein tíma afturat.

Hann skrivar at Eivør var eitt av teimum bjartastu talenstunum, og at hennara rødd gjørdist stórsta upplivingin á endakonsertini á festivalinum. *"I perioder brugte hun stemmen som sit andet instrument foruden guitaren og frembragte stemninger af drama eller skønhed ved ordløs sang - en slags usynlig keyboard. For at udføre dette uden mislyde kræves der megen træning og erfaring, men trods sin alder har Pálsdóttir allerede prøvet meget i et krydsfelt mellem klassisk, folk, jazz og rock."*

Hann sigur um framførsluna at Eivør og Bill Bourne vístu, at tveir gittarleikarar og sangarar væl megna at fylla ein stóran pall.

**nud**

# Kappróður í Sorø

KAPPRÓÐUR

Seinasti róður í røðini av kapróðri i Danmark verður hildin í Sorø 10. september. Byrjað verður kl 13:30, og steyp og medaljur verða handaðar eftur róðurin.

Róð verður við 6 og 10 mannaførum. Í genturóðrinum luttekur Sílið úr Havn.

Undir róðrinum er høvi at keypa breyð við føroyskum viðskera, og okkurt drekkandi kann eisini fáast afturvið. Eisini verða lutaseðlar seldir, har høvuðsvinningurin er ein ferð til Føroyar við Atlantic Airways.

Listamaðurin Niels Salmony hevur framsíning av málningum í neysti okkara undir róðrinum, sigur Føroyskt Felag á Vestursælandi í tíðindaskrivi.

